## Lærari til Skálavíkar skúla

**Søkt verður eftir**
einum lærara í parttíðarstarv (uml. 13 t / v) skúlaárið 07 / 08 at lesa avlopstímar.

**Skúlanum tørvar lærara, ið m.a. kann átaka sær at undirvísa í:**
- enskum í 4. og 5. árgangi
- náttúru / tøkni í 4. og 5. árgangi

**Førleikakrøv:**
- Læraraútbúgving er ynskilig.
- Onnur eru tó eisini vælkomin at søkja.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður lønt í lønarflokkunum 18.1 – 27.4 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir:**
Umsóknir við avriti av prógvi, CV og møguligum viðmælum skulu vera skúlaleiðaranum í hendi **í seinasta lagi 14. august kl. 12.00.**

Kristina Mikkelsen
Sandabrekkan 4,
FO-210 Sandur

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til skúlaleiðaran, Tlf. 361127
Teldupost: kristina.mikkelsen@skulin.fo

*Skálavíkar skúli hevur komandi skúlaár 15 næmingar í 1. – 5. árgangi og 3 lærarar.*

**Vit hava summarfrí frá 6. august til og við 20. august**

A.H. Jensen
- útgerð til vaskifólkið
STOFFALÁG 25 · FO-100 TÓRSHAVN
TEL 322676 · FAX 318101
E-MAIL: A_JENSEN@POST.OLIVANT.FO

Frá Miðvágs kommunu

## SUMMARFRÍ

Vegna summarfrí, verður kommunuskrivstovan stongd frá **mánadegi 06. august** og 14 dagar fram, latið verður uppaftur **mánadagin 20. august kl. 13.**

MIÐVÁGS KOMMUNA

## BRÚÐARKOYRING



Skalt tú hava eina serliga uppliving, so er at leiga ein bil hjá Havnar Bilasavni frá Sp/F Bilrøkt í Havn. Vel t. d. ein svartan Ford A frá 1930, ein hvítan Chevrolet frá 1931, ein bláan Chevrolet Skyline frá 1952 ella ein brúnan Jaguar frá 1978

**Ring til Bilrøkt á 588880**
www.bilrokt.fo bilrokt@bilrokt.fo

FØROYA LÆRARASKÚLI

## Reingerðisfólk til Føroya Læraraskúla

Lýst verður eftir reingerðisfólkum til Føroya Læraraskúla, 4 tímar um dagin.

Arbeiðstíðin er allar skúladagar frá kl. 14.30 til 18.00.

Størvini verða sett frá 1. sept.

Størvini verða sett sambært sáttmála millum Havnar Arbeiðskvinnufelag og Fíggjarmálaráðið.

Tey, ið vilja hava meira at vita, kunnu seta seg í samband við skúlatænaran, á telefon 213508.

Teldupostur kann sendast til flsk@flsk.fo.

Umsóknir skulu verða skúlanum í hendi innan 10. aug. 2007

**Føroya Læraraskúli**
**Postrúm 348 · 110 Tórshavn**

Atlanticpane P/F
Tlf.: 42 14 05 • Fax 42 16 02

## Arbeiðsfólk søkist

Søkt verður eftir fólki at arbeiða á Atlanticpane í Kollafirði til termorútaframleiðsluna og annað fyrifallandi arbeiði innan glas. Arbeiðstíðin er 40 t. um vikuna men til tíðir kann man vænta yvirarbeiði.

Løn er sambart sáttmála hjá Føroya Handverkarafelag

Meira fæst at vita um starvið við at ringja á tlf. 739403

Umsóknir skulu verða Atlanticpane í hendi í seinasta lagi **10. august**

**Atlanticpane P/F**
Ósabakkavegur
Postsmoga 30
410 Kollafjørður

**Klaksvíkar Sjúkrahús**
FO-700 Klaksvík

**Ortopædkirurgiskur skómakari og bandagistur frá SHAVA**, verða á Klaksvíkar Sjúkrahúsi **28. august 2007** og á Landssjúkrahúsinum **29. til 30. august 2007.**

Tíð fæst við at ringja á tlf. 45 45 45, **mánadag og týsdag kl. 10-12**, í seinasta lagi **týsdagin 21. august 2007**

Lýsing eftir

## pedagogi til Vípuna

Sjálvsognarstovnurin Vípan søkir eftir 1 pedagogi 30 tímar til at byrja 15. august 2007 ella eftir nærri avtalu. Talan er um varðaleiðarastarv.

Vípan er ein barnagarður við børnum í aldrinum frá 2-8 ár. Eftir summarfrítíðina fer Vípan at taka ímóti børnum frá 2-8 ár. Hettar er fyrsta árið, Vípan fer at taka í móti frítíðarskúlabørnum og vøggustovubørnum.

Stovan har tú kemur at arbeiða er ein barnagarðsstova við børnum frá 2-5 ár. Arbeiðstíðinar eru skiftandi, frá 7.30-17.00.

**Vit bjóða eitt áhugavert starv:**
- har náttúran hevur stóran leiklut í gerandisdegnum og har spæl fyllir nógv
- har virðing og trivnaður hjá barninum er í hásætið
- við opinleika og einum jaligum hugburði
- við broytingum har tú hevur tína ávirkan

**Vit vænta av tær:**
- At tú ert útbúgvin pedagogur/hevur royndir og fagliga vitan
- At tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- At tú ert opin fyri broytingum
- At tú hevur góð samstarvsevnir yvir fyri børnum, foreldrum og starvsfelagum
- At tú sært fyrimunir fram um vansar

Um pedagogur ikki søkjur, verður hjálparfólk sett í starvið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Eyð Skúvadal, leiðara á tlf 317535/ 287535

Umsókn saman við avrit av prógvum og viðmælum, skal vera stovninum í hendi, seinasta lagi 14. 08. 2007

**Vípan**
Vípuvegur 3 · 100 Tórshavn
Tlf. 317535 / 287535
bg-vipan@post.olivant.fo

## Starvslýsing

BO Service Sp/f er ein fyritøka í menning og við nógvum avbjóðingum. Í sambandi við vaksandi eftirspurning á arbeiðsmarknaðinum verður søkt eftir royndum fólki til HVS og ventilatiónsarbeiðir, sveisiarbeiðir, smærri maskinumvælingar og annað viðlíkahaldsarbeiði. Vit gera arbeiðir bæði fyri stovnar, virkir og privatfólk.

**Førleikakrøv**
- Vit vænta at tú hevur viðkomandi útbúgving so sum maskinmeistari/skipsmaskinistur, rørsmiðjur e.l.
- At tú ert røkin, fleksibul, hevur góð samstarvsevnir og kann arbeiða sjálvstøðugt
- Ert fúsur at finna nýggjar loysnir og ikki ert bangin fyri nýggjum avbjóðingum

Løn sambært avtalu. Nærri fæst at vita við at venda sær til Boða Olsen á tlf. 521500

**BO Service Sp/f**
Leitisgøta 7 · FO-160 Argir
T-postur: bodi@kallnet.fo
tlf. 321500 · fartlf. 521500